Løgmaður um blaðútberingina:

Ógreitt um blaðútberingina

Løgmaður heldur, at tíðarspurningurin hevur gruggað málið um stuðulin til blaðútbering á fíggjarlógini

FÍGGJARLÓGIN
Heri á Rógvi

Anfinn Kallsberg, løgmaður, dugir ikki at siga, hvar pengarnir, sum vóru ætlaðir til blaðútberingina á fíggjarlógini, eru blivnir av.

Fyrr í vikuni stóð at lesa um, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevði valt, í samráð við løgmann, at lata 1,9 mió. av sínari játtan sum stuðul til blaðútberingina. Landsstýrismaðurin greiddi frá, at peningurin varð funnin á egnum kontoum, men tað tá avtornaði vóru pengarnir ikki við í uppskotinum.



Løgmaður dugir ikki at siga, hvat hendi við pengunum til blaðútberingina, men stutta tíðarfreistin hevur mest sannlíkt verið orsøkin

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, vísti á, at orsøkin til at stuðulin til blaðútberingina ikki kom við var, at uppskotið kom ov seint.

Bjarni Djurholm heldur orðini hjá Karsten vera undanførsla, og sostatt hava teir báðir hvør sína frágreiðing, sum ikki heilt samsvara.

Veit ikki

– Vit hava ongantíð fingið viðgjørt endaliga samlaða fíggjarlógaruppskotið við øllum landsstýrismonnunum, og tí dugi eg ikki at siga, hvar pengarnir eru vorðnir av, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður veit at siga, at tíðarfreistin hevur havt sína ávirkan, tí samgongan er so nýggj. Hann vísir samstundis á, at ynskini eru so mong frá landsstýrismonnunum, og tá avtornar er ymiskt, sum ikki var eftir upprunaliga ætlanini hjá landsstýrismonnunum.

– Tað er ein øgiligur kampur, tá fíggjarlógaruppskotið skal gerast, og ógvuliga ringt at finna eina semju. Tað snýr um raðfestingar, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal eisini raðfesta, sigur Anfinn Kallsberg.

Sjálvur hevur Anfinn Kallsberg arbeitt nógv við málinum, og hansara fatan er eisini, at stuðulin eigur at verða latin. Løgmaður sigur, at stuðulin var ætlaður sum stuðul til útjaðaran.

– Eg vóni, at vit fáa hetta upp á pláss í viðgerðini av fíggjarlógini, sigur Anfinn Kallsberg.

Ikki í Landsbankan

Ætlaði skattalættin, sum er feldur í samgonguskjalið, verður til veruleika, sigur Anfinn Kallsberg.

– Hann er partur av einari politiskari avtalu, og tí verður hann til veruleikan, sigur løgmaður.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sigur, at skal ætlaði skattalættin fremjast fyri 50 mió, so skulu hesir pengarnir sparast í teimum ymsu játtanunum. Óli Breckmann hevur fyri Sosialinum gjørt púra greitt, at um neyðugt verður farið í Landsbankan eftir pengunum.

Hesum er Anfinn Kallsberg tó ikki heilt samdur við.

– Tað er als ikki í lagi, at vit fara í Landsbankan eftir pengunum. Samgongan hevur gjørt av, at útreiðslurnar ikki skulu veksa meira enn inntøkuvøksturin, og har skulu vit finna pengarnar, sigur Anfinn Kallsberg.

Annars heldur Anfinn Kallsberg, at samgongan er sloppin væl frá sínum fyrsta fíggjarlógaruppskotið.

– Viðgerðin hevur verið væl betri í ár enn undanfarin ár. Eg vænti, at fíggjarlógin verður samtykt stórt sæð sum hon, men onkrar justeringar verða nokk gjørdar, sigur Anfinn Kallsberg.

Lítið at frøðast um í Hoydølum

Tvær milliónir eru í fíggjarlógaruppskotin um fyri 2003 settar av til nýggjan Studentaskúla í Hoydølum, men vánaligu arbeiðsumstøðurnar í Hoydølum, ið Arbeiðseftirlitið hevur staðfest, eiga ongan góðan á fíggjarlógini

MIÐNÁMSSKÚLAR
Heri á Rógvi

Studentaskúlin í Hoydølum er kanska besta klimaið í landinum fyri eldhugaðar miðnámsnæmingar, men fyri næmingar og lærarar er inniklimaið framvegis trongt, og soleiðis verður tað eina tíð enn

Mynd: Jens Kristian Vang.

Ov ringt luftskifti og ov nógv CO_2 (koltvísýrni). Soleiðis ljóðaðu boðini frá Arbeiðseftirlitinum, eftir at fólk frá stovnunum høvdu gjørt kanningar í Studentaskúlanum og HF-Skeiðinum í Hoydølum fyri góðum tveimum árum síðani.

Partar av degnum var luftskiftið í stovunum so vánaligt á skúlanum, at hetta fór um mest loyvda markið.

Hetta gjørdi Arbeiðseftirlitið skúlaleiðsluna varhuga við í 2000. Við boðunum um vánaliga luftskiftið fylgdi eisini eini kravboð um, at umstøðurnar skuldu betrast. Var hetta ikki gjørt, fekk tað fylgjur fyri skúlan. Arbeiðseftirlitið var seinni noydd at taka kravboðini aftur, tí eftir eina lógarbroyting hevði stovnurin ikki heimild at geva tílík kravboð.

Hendan heimildin er tó komin í rættlag aftur hjá Arbeiðseftirlitið. Í februar mánaði í ár varð skúlaleiðslan í Hoydølum aftur kunnað um, at kravboðini um betri luftskifti standa við.

Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitið, sigur, at kanningarnar hjá teimum greitt vístu, at luftskiftið ikki var á tí loyvda støðinum. Mest upplagda loysnin upp á trupulleikan var ein nýggj útluftingarskipan.

Trupulleikin er tó bert tann, at skúlin ongar pengar eigur at gera eina nýggja útluftingarskipan fyri. Og hesar pengarnir fær skúlin eftir øllum at døma heldur ikki í 2003.

Mads Winther, rektari, sigur, at skal nakað munagott gerast fyri betra um arbeiðsumstøðurnar er neyðugt við tíggju milliónum krónum.

Skúlin í Hoydølum er upprunaliga bygdur til tólv flokkar, men skúlin hevur í løtuni 24. Sigast skal eisini, at skúlin nýtir eisini gomlu kostdeildina – gamla hospitalið – til skúlastovur, soleiðis at hetta gevur eisini ein nakað øktan kapasitet.

– Luftskiftið er serliga vánaligt seint á degnum í teimum stovum og flokkum, har nógvir næmingar eru, sigur Mads Winther.

Stjórin á Arbeiðseftir-litinum kallar støðuna í Hoydølum fyri ikki serliga sunna, men talan er ikki um nakran yvirhangandi vanda, heldur hann.

Arbeiðseftirlitið hevur givið Studentaskúlanum boð um at koma við einari arbeiðsætlan fyri, hvussu umstøðurnar skulu betrast, men hesa hava teir, sambært Karl Joensen, ikki fingið enn.

Arbeiðseftirlitið kann í ringasta føri velja at lata skúlan aftur, um arbeiðsumstøðurnar framhaldandi eru líka ringar. Tað skal tó ganga ógvuliga illa, um hetta stigið verður tikið, og tá skal dómsvaldi eisini upp í leikin.

Til nýggjan skúla

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 stendur eisini, at ætlanin við at umbyggja verandi skúla í Hoydølum nú er endalig slept. Orsøkin er, at tann verkætlanin vildi verið alt ov kostnaðarmikil. Ístaðin eru pengar játtaðir til nýggjan skúla í Marknagili. Tað stendur at lesa í fíggjarlógaruppskotini, at hendan ætlanin skal samskipast við útbyggingarætlanina hjá Tekniska skúla í Havn og Føroya Handilsskúla í Havn. Talan er sostatt um tann so nógv umrødda skúlamiðdepilin. Tvær milliónir eru settar av til hetta endamálið í 2003. Pengarnir skulu nýtast til keyp av grundøki og planering av økinum.

– Sjálvur haldi eg, at tað mest umráðandi er, at vit fáa betri umstøður. So er tað ikki so týdningarmikið fyri meg, hvar hann verður, sigur Mads Andrias Winther.

Ikki næmingarnir

Áhugavert er eisini at nevna, at Arbeiðseftirlitið sum so ikki tekur fyrilit fyri næmingunum í Hoydølum. Lærararnir eru settir í starv har av Mentamálaráðnum, og teir eru umfataðir av teimum heimildum og fyrilitum, ið Arbeiðseftirlitið tekur. Karl Joensen sigur, at teirra kanningar sum so ikki snúgva seg um arbeiðsumstøðurnar hjá næmingunum, tí hesir eru ikki nakar settur starvsbólkur, men tað eru lærararnir.

Hvussu nógv vit nú einaferð vildu og royndu, so fingu vit ikki tað minstu viðmerkingina úr Mentamálaráðnum.

UTTAN ÚR HEIMI

Blix bíðar eftir ST

Teir fyrstu vápnaeftirlitsmenninir kunnu fara til Irak um fjúrtan dagar, men leiðari teirra, Hans Blix, vil hava trygdarráðið at gera eina nýggja samtykt, áðrenn teir fara avstað

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen

Á einum næstan tríggjar tímar longum fundi fyrrakvøldið greiddi Hans Blix londunum í ST-trygdarráðnum frá samráðingunum, sum hann hevur havt við irakskar embætismenn, og sum endaðu við, at Irak játtaði at lata eftirlitsmenninar koma aftur til landið.

Aftan á fundin segði svenski formaðurin, at tað løgfrøðiliga grundarlagið fyri at taka kanningarnar í Irak uppaftur er í lagi, men sjálvur helt hann tað vera rættast at bíða, til ST hevur gjørt eina nýggja samtykt um Irak.

- Tað hevði verið býtt at sent eftirlitsmenninar avstað, skuldi trygdarráðið seinni broytt heimildir teirra, segði formaðurin hjá vápnaeftirlitsmonnunum.

Hans Blix duldi ikki fyri, at ávísir trupulleikar eru eftir at greiða í samráðingunum við iraksku myndugleikarnar. Eftirlitsmenninir ætla sær at avhoyra fleiri irakar í sambandi við kanningarnar. Tað hevur stjórnin í Bagdad góðtikið, men hon hevur lagt ta treyt við, at eitt umboð fyri iraksku myndugleikarnar var fyglja við avhoyringunum. Tað heldur ST ikki, tí vandi er fyri, at tey avhoyrdu fara at dylja upplýsingar, um ein almennur embætismaður situr í avhoyringarhølinum.

Eitt annað mál, sum heldur ikki er endaliga loyst, eru tær átta forsetaborgirnar hjá Saddam Hussein. Irak heldur seg til eina avtalu, sum landið gjørdi við Kofi Annan, aðalskrivara í 1998. Eftir henni hava eftirlitsmenninir ikki atgongd til borgirnar hjá Saddam, men USA og Bretland krevja, at eftirlitsmenninir skulu sleppa at kanna borgirnar.

Keldur í New York siga, at tey 15 limalondini í trygdarráðnum vóru væl nøgd við arbeiðið, sum Hans Blix hevur gjørt seinastu dagarnar.

Samstundis heldur amerikanska stjórnin fram við sínum royndum at fáa hini limalondini í trygdarráðnum at taka undir við einari nýggjari samtykt um Irak.

Vilja hava skópussara til forseta

Gjaldoyrað fellur við rúkandi ferð, útlendski kapitalurin rýmir av landinum, og arbeiðsloysið veksur. Men brasiliumenn vilja hava ein skópussara til forseta

VAL Í BRASIL
Árni Joensen



Luiz Inacio Lula da Silva ella Lula, sum hann vanliga verður nevndur, verður eftir øllum at døma valdur til brasilskan forseta í morgin

Í morgin skulu veljararnir í Brasil velja nýggjan forseta. Trý valevni hava stillað upp, og valstríðið hevur borið dám av tí vanliga hátíðardáminum í Brasil við nógvum litum, ljósi og ikki minst dansi.

Ikki tí. Fólkið í Brasil hevur ikki so nógv at fegnast um. Búskapurin er illa fyri, nógvir útlendskir íleggjarar hava stungið í sekkin, og arbeiðsloysið veksur í hvørjum. Nógv stúra fyri, at gongdin skal gerast tann sama sum í grannalandinum Argentina.

Nógv bendir á, at brasilsku veljararnir longu hava avgjørt, hvør skal leiða landið tey næstu árini. Veljarakanningarnar benda á, at tann 57 ára gamli fyrrverandi skópussarin og jarnsmiðurin Luiz Inacio Lula da Silva hevur teir bestu møguleikarnar. Lula, sum hann vanliga verður nevndur, fær sambært teimum seinastu kanningunum meiri enn tvær ferðir so nógvar atkvøður sum hini bæði valevnini.

Lula, sum hann vanliga verður róptur, er ikki høgt í metum í brasilska fíggjarheiminum, og teir útlendsku íleggjararnir hava eisini gjørt greitt, at hann er ikki teirra maður. Men hetta hevur ikki ávirkað veljararnar, sum eftir øllum at døma fara at velja hann til forseta í morgin.

Russar hava áhugamál í iraksku oljuni

Vladimir Putin, forseti hevur vissað landsins størsta oljufelag um, at tess áhugamál í Irak eru trygg, skuldi Saddam Hussein fallið

OLJA OG POLITIKKUR
Árni Joensen

Bretska blaðið Financial Times vil vera við, at Russland nýtir sín sýtingarrætt í ST til at fáa sum mest burturúr, áðrenn landið møguliga fer at taka undir við amerikansku ætlanini um at leypa á Irak. Blaðið sigur seg hava fingið at vita, at russiska stjórnin hevur veitt landsins størsta oljufelagið, Lukoil, vissu fyri, at tess áhugamál í Irak eru trygg, sama hvat fer at henda.

- Seinastu árini hava russar verið væl við irakar, amerikanarar og aðrar, bara teir kunnu fáa fíggjarligan vinning burtur úr samveruni. Í veruleikanum hava amerikanarar og irakar stríðst um at koyra sum mest í tann russiska lumman, skrivar Financial Times.

Forstjórin í Lukoil, Vagit Alekperov, sigur við bretska blaðið, at russisku oljuáhugamálini í Irak hava verið frammi hvørja einastu ferð, Vladimir Putin, forseti hevur tosað við amerikanskú stjórnina um Irak.

- Eg havi fingið váttan fyri, at russiska stjórnin verjir okkara áhugamál, og hendan váttan er eisini galdandi, skuldi Saddam Hussein falla, sigur Alekperov.

Russiski staturin eigur 14 prosent av Lukoil, sum eigur 68 prosent av oljuleiðini Vestur-Kurna í Irak, har íløgur eru gjørdar fyri einar 44 milliardir krónur. Oljuleiðin er ein tann størsta í heiminum og verður mett at rúma umleið 20 milliardum tunnum.

Eingin hólmgonga

Ein irakskur varaforseti heldur, at Irak og USA eiga at avgera stríðið landanna millum við at lata teir báðar forsetarnar, Saddam Hussein og George W. Bush, fara í hólmgongu - við skammbyrsu.

Taha Yassin Ramadan, varaforseti sigur, at amerikanarar kunnu tilnevna ein bólk og irakar sín. Síðani skal forseti dystast ímóti forseta, varaforseti ímóti varaforseta o.s.fr.

Men amerikanarar halda lítið um hugskotið. Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Ari Fleicher, helt uppskotið hjá irakska varaforsetanum vera láturligt, og tað verður tí ikki tikið í álvara í Hvítu Húsunum.

Saddam Hussein sæst ofta avmyndaður við byrsu í hond, og George W. Bush nýtir ofta myndir frá gomlu westerntíðini, tá hann tosar, so uppskotið hjá Taha Yassmin Ramadan var kanska ikki so veruleikafjart.

Kann detta niður

Múrurin uttan um Tempulplássið í Jerusalem er so illa farin, at hann kann rapa, og tað kann hava við sær, at tann kenda moskan, Al-Aqsa, fer at detta niður. Tað stendur í einari frágreiðing, sum ísraelskir fornfrøðingar hava latið stjórnini.

Í frágreiðingini verður sagt, at hetta kann fáa sera óhepnar avleiðingar, tí múrurin kann lættliga dettan oman yvir teir nógvu palestinararnar, sum dagliga liggja á knæ har og biðja. Serliga óheppið verður tað, um múrurin rapar í novembær, tá halgimánaðurin hjá muslimunum byrjar.

Ein av teimum ísraelsku fornfrøðingunum, Eilat Mazar, sigur, at hann er ikki í iva um, at múrurin fer at rapa og síðani moskan. Tað er bara ein spurningur um tíð, verður rinki gjørt, sigur Mazar, sum starvast á lærda háskúlanum í Jerusalem.

Vorðið sum skjútti

Ein franskur veiðimaður lat nú um dagarnar fýra skot av eftir nøkrum krákum, sum sótu á einari háspenningsleiðing. Krákurnar rakti hann ikki, men elleiðingin fór tvørturav, so 1.200 hús mistu streymin.

Tann 31 ára gamli maðurin hevði skjótiloyvi, men hann hevur greitt frá, at hann helt seg ikki hava nóg góða venjing. Eftir at hava roynt seg eftir krákunum, setti hann nakrar plastikfløskur á ein garð og fór at skjóta eftir teimum. Men hann var so óheppin, at eitt av skotunum fór framvið og rakti eina kúgv, sum lá og jótraði hinumegin garðin. So væl var rakt, at kúgvin steindoyði.

Bóndin, sum átti kúnna, valdi at boðsenda løgregluni, og skjótiloyvið hjá tí óhepna veiðimanninum er uttan iva í vanda.

Formaðurin svikaði

Norska løgreglan og tollvaldi avdúkaðu týsdagin umfatandi brot á fiskiveiðireglurnar, tá teir kannaðu viðurskiftini á einum fiskamarknaði í Vesterålen.

Tað vísti seg, at 800 tons av sild fyri 1,6 millión krónur vóru ikki givin upp, men tað, sum serliga hevur vakt ans í málinum, er, at ein av monnunum aftan fyri svikið, er formaður í tí lokala fiskimannafelagnum og harafturat bygdarráðslimur.

Brot á fiskiveiðireglurnar verða revsað harðliga í Noregi, og teir, sum nú eru skuldsettir fyri at hava svikað við teimum 800 tonsunum av sild, kunnu fáa heilt upp í seks ára fongsul.